# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Breiðari støði

Løgmaður roynir at gera samgongustøðið breiðari. Tað er eingin lættur setningur hjá løgmanni at royna at styrkja eitt grundstøði, ið tykist vera farið at at ryðja undan. Tað er tó greitt, at løgmaður metir ikki støðið í samstarvsavtaluni við Sjálvstýrisflokkin at vera haldgott. Hann roynir tí eftir breiðari støði. Løgmaður hevur mist trúnna á Sjálvstýrisflokkin. Ein orsøkin kann verða atburður Sjálvstýrsifloksins undir viðgerðini av málinum um vinnuligan fiskiskap, sum avdúkaði, at politisku sjónarmiðini hjá tinglimum floksins eru sum dagur og nátt. Løgmaður kann hava mett, at fiskidagarnir eru valla hitt einasta málið, har Sjálvstýrisfloksins tingmenn eru ósamdir. Ein minnilutastjórn við Sjálvstýrisflokkinum sum álit fór sostatt ikki at geva tann politiska stabilitet, sum løgmaður leggur so stóran dent á.

Løgmaður fer so til Sambandsflokkin, samstundis sum hann boðar frá, at hann nú miðar móti eini meirilutastjórn. Tað er óvist, hvørt løgmaður hevur boðað Sjálvstýrisflokkinum frá frammanundan, at hann nú fór at venda sær til stóru andstøðuflokkarnar. Formaður Sjálvstýrsifloksins var so mikið firtin í fjølmiðnum í gjár, at hetta kundi bent á, at flokkur hansara ikki var kunnaður. Er hetta so, ja, so er álitið millum løgmann og Sjálvstýrisflokkin farið, og so er tann minnilutasamgonga, sum fleiri so ovurfegin lovprísaðu fyri bert viku síðan, vera endaliga fokin.

Sambandsflokkurin tykist áhugaður í at koma í samgongu, men treytir hansara eru so harðar, at tær neyvan verða góðtiknar av Tjóðveldi og Miðflokki. Tað er neyvan av tilvild, at fíggjarmálaráðharrin dagin eftir kunnger, at hann nú leggur blokkniðurskurðin upp á hundrað milliónir á landsstýrisborð. Sostatt verður lættari sagt enn gjørt at taka Sambandið upp í verandi samgongu.

Tað er eitt sindur ógreitt, hvussu Tjóðveldi stillar seg til útspæl løgmans. Tað er óhugsandi, at løgmaður ikki hevur ráðført seg við Tjóðveldi, áðrenn hann fór undir sínar sonderingar, so her man onkur fressalúka standa opin. Sambandsflokkurin tykist vera tann borgarligi flokkur, sum Tjóðveldi best sampakkar við, so henda loysn er ikki óhugsandi, treytað av at Tjóðveldi sleppur at hava Miðflokkin innanborða. Hevur løgmaður hinvegin ikki tryggjað sær viðhald frá Tjóðveldinum, so kann hann skjótt fáa ein álvarsaman trupulleika og harvið spæla sær kortini av hendi.

Um løgmaður nú fær trupulleikar við sínar samgonguflokkar, hevur hann møguleikan at royna gomlu samgongu, um hann ikki skal útskriva val ella leggja kongin. Gamla samgonga kundi møguliga tryggjað tann stabilitet, sum løgmaður leggur so stóran dent á, men her eru nógvar forðingar, eitt nú blokkur, skattapolitikkur og fiskivinnupolitikkur. Enn er ov tíðliga at spáa um úrslitið av royndum løgmans, men givið er, at hann frá nú av má stíga sera varliga, um hann vil varðveita sessin.

**Sosialurin**

## Ein viðmerking til Árna Dam, russiska konsulin

JÓHANNA FEILBERG
Góðskusamskipari
Dygd.fo

**Alivinnan sjuskar**
At russar nú seta bann fyri innflutningi av føroyskum alifiski, kemur ikki óvart á teg. Tú heldur at alivinnan hevur sjálv skuldina av, at so er, tí at kanningarfólkini vóru her í mai. Og tí skuldi alivinnan fyri langari tíð síðani havt fingið hesi viðurskiftini í rættlag, áðrenn bannið gjørdist veruleiki.

Eg vil geva tær hesa viðmerking:

Tað er rætt, at russiski myndugleikin var her í mai. Undir sjálvari vitjanini, fekk alivinnan onga frágreiðing um teirra niðurstøðu. Tann 25. juli hoyra vit hesi úttalilsi í fjølmiðlum, at:

Ongi av føroysku laksavirkjum vóru tikin av góðkenda listanum orsakað av staðfestingum á sjálvari vitjanini. Treyðugt so; virkini hava fingið fráboðan um fleiri frávik frá russisku saniteru reglunum og skulu sjálvandi rætta hesi frávik. Heilsufrøðiliga starvsstovan fylgir við rættandi atgerðunum og samskiftir við Rosselkhoznadzor (matvørueftirlitsmyndugleikan í Russlandi). So sæst hvat russar fara at gera.

Tann 26. juli móttekur alivinna eina frágreiðing um staðfestu frávik.

Tann 11. august koma boð frá russisku veterineru myndugleikunum um, at fiskavørur frá føroyskum laksavirkjum ikki kunnu innflytast til Russlands eftir 01.09.2008.

Her hava onga ávaringarklokkur ringt. Og russar eru heldur ikki komnir aftur til Føroya at kanna eftir, um virkini eru farin í holtur við at rætta staðfestu frávik, áðrenn teir seta bannið.

Vert er eisini at nevna, at beint eftir russisku vitjanina, fekk eitt laksavirki eina IFS/BRC góðkenning, sum er eitt tað flottasta certificat, tú kanst fáa. Men tað er ikki nóg mikið fyri russisku saniteru myndugleikarnar.

So ein áheitan til tín, harra konsul! Set teg inn í sakina, áðrenn tú úttalar teg um, at alivinna sjuskar!

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**35 partur**

Afturlítandi.

Vit hava nú farið ígjøgnum alt gamla testamenti og hava sæð so tíðuliga, hvussu teir sum skrivað hana hava ,allir siga, at teir hava fingið opinberingar frá Gudi, Gud hevur talað til teirra og biður teir fara til ísraelsfólk. Vit hava sæð, at boðskapurin teir bera, er til ísraelsfólk fyrst og fremst. Høvuðsboðskapurin er hetta: Teir tala dóm yvir Ísrael og Juda fyri syndir teirra, og at tey fyri hetta skulu verða rikin út úr landinum og verða herðleidd til allar tjóðir. Síðani profetera teir, náðilyfti fyri eina tíð, sum liggur langt frammi ,hetta er ikki uppfylt enn, Teir tala ein strangan dóm yvir heidningatjóðirnar og siga, at at enda verða tær allar týndar. Eisini her er ta syndin, sum er atvoldin.

Síðani skriva teir um náðilyfti til øll, sum óttast Gud, hvørji tjóð ella tungumáli tey enn munnu vera av. Síðani mugu vit ikki gloyma tann mest týdningarmikla boðskapin, sum alt gamla testamenti handlar um, tað er um hin lovaða Messias. Tað evnið havi eg ikki gjørt nógv við her, tí hetta skuldi fyrst og fremst vísa á, hvussu bíblian er vorðin til. Hesum spurninginum sum so mangur man sita við.

Í rómbrævinum 3,1-2 sigur Paulus:

Hvat hevur tá Jødin framum? Ella hvat nyttar umskeringin?

Nógv á allan hátt! Fyrst og fremst tað, at orð Guds eru litin teimum upp í hendur.

Soleiðis er bíblian vorðin til. Gud útvaldi Ísrael til millum annað at gera hetta verkið. Hann innblásti menn til at skriva og gav øðrum vísdóm til at siga, hvat skuldi koma við í hesa undurfullu bók.

Lat meg skjóta inn her viðvíkjandi profetiunum um Messias, sum eg nevndi omanfyri, at fyri nøkrum árum síðani skrivaði eg her í sosialinum eina greinarøð, sum eg kallaði: ”Kristus í skriftunum”. Har royndi eg at fáa mong av teimum beinleiðis profetiunum um Messias fram og mangar av teimum hendingum, bíblian sigur frá, sum eru góðar myndir av honum og frelsuni í honum.

Soleiðis kom gamla testamentið til okkara. Tá ið so seinni nýggja testamenti kom afturat, og boðskapur bíbliunar bleiv kendur, hevur hon verið hámett av teimum flestu. Gud hevur lagt ævinleikan í menniskjað, og menniskja er tí religiøst av náttúru. Bíblian hevur verið rokna sum ein heilag bók, ein góð bók, ein bók full av kærleika til tann, sum óttast Gud. Ein bók, sum hevur verið mett nógv hægri í virði enn allar aðrar bøkur. Eg minnist, pápi segði frá, hann fór í 1954 ein túr suður til Róm saman við Esmar Fuglø og konu hansara, eisini var ein systir mín við, at einaferð tey fór gjøgnum tollin, og hann lat kuffertið upp, og tá ið teir sóu, at bíblian lá ovast, bóðu teir hann bara lata kuffertið aftur.

Tá ið nú bíblian hevur verið so høgt vird, hvussu ber tað tá til, at hon hevur ligið undir støvi á hillunum, ólisin. Jú, tað er tí, at vit av náttúru ganga burtur frá Gudi, og vilja einki hava við hann at gera. Hetta sigur bíblian eisini, t.d. í Esaias 53.

Bíblian er tí sera týdningarmikil at koma at kenna. Tú kanst verða frelstur við at lesa eitt greitt vers, trúgva tí, og vísa at tín túgv er álvara við at lata teg doypa. Men at læra um Gud, hvat hann vil við lívi okkara , ganga fram og styrkjast í trúnni, mást tú lesa skriftirnar. Lít ongan prest ella prætikumann á, uttan tú hevur kannað, hvat skriftirnar sjálvar siga um tað ávísa, sum talað hevur verið um. Ger, sum teir í Berøa, vit lesa hetta í ápostlasøuni 17,11:

Hesir vóru meiri rætthugsandi enn hinir í Tessalonika; teir tóku ímóti orðinum við allari vælvild og rannsakaðu dagliga skriftirnar fyri at síggja, um hetta var so.

**Framhald**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.